gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

### Hóvligur sjálvstýrispolitikkur – vinstrumegin miðjuna?

Miðflokkar hava stóran týdning í politikki. Vit hava t.d. sæð tað í Týsklandi og í Danmark. Í Týsklandi vóru teir Fríu Demokratarnir í nógv ár stjórnarflokkur saman við Sosialdemoratiska flokkinum, áðrenn hann hálsaði um og fór í samgongu saman við Kristiligu Demokratunum. Radikali Vinstriflokkurin í Danmark var stjórnarflokkur saman við sosialdemokratunum í fleiri tíggju ár, til hann fór í stjórn saman við teimum borgarligu í áttatiárunum, men er nú aftur saman við sosialdemokratunum. Í Føroyum hevur flokkurin í miðjuni - Sjálvstýrisflokkurin - bæði verið uppi í landsstýrum við samríkisflokkum og sjálvstýrisflokkum. Hann hevur verið í borgarligum landsstýrum og hann hevur verið í sosialdemokratiskum landsstýrum. Hann hevur ofta verið tungan á vágskálini, og hann verður óivað aftur avgerandi fyri, hvør skipar landsstýrið. Tað var tí spennandi og áhugavert at síggja, hvør vann fyrsta formansvalið í Sjálvstýrisflokkinum.

Tey, sum fylgja við og lurta eftir orðaskiftum, hava uttan iva ásannað, at Sámal Petur í Grund er meiri sjálvstýrissinnaður enn Helena Dam á Neystabø. Viðhvørt er hann er meiri loysingarsinnaður enn summir tjóðveldismenn. Eysturoyingurin er helst meiri víðgongdur enn almenna kósin hjá tí Gamla sjálvstýrinum var og er. Afturímóti tykist, at Helena Dam á Neystabø nú liggur á tí kós, sum teir hóvligu í Sjálvstýrisflokkinum kunnu góðtaka.
Tá sagt verður nú, er tað tíð, at áðrenn miseydnaða samráðingarfundin 26. oktober, var minni munur á henni og hinum fullveldisfólknum í sjálvstýrissamgongu. Tá landsstýrið endurskoðaði fullveldisætlanina, og fekk Tjóðveldisflokkin at snara 180 stig, setti Sjálvstýrisflokkurin síni týðiligu merki í nýggju sjálvstýristilgongdina.

Landsstýriskvinnan vann valið og tað merkir, at Sjálvstýrisflokkurin fekk ein formann, sum tykist at vera meiri hóvlig í sjálvstýrispolitikki. Harafturat liggur hon helst vinstrumegin miðjuna og byggir óivað sína støðu á ta meiri samhaldsføstu hugsjónina, meðan Sámal Petur í Grund segði við fjølmiðlar undan formansvalinum, at hann helst lá høgrumegin miðjuna. Tað benda eisini politiskar útsøgnir frá honum á, hóast hesi orð helst eisini vórðu søgd fyri at fáa fleiri borgarlig sjálvstýrisfólk á tann søguliga fundin.

Formansvalið kann kanska benda á, at tað ber til at fáa eina hóvliga loysn í málinum um framtíðarstøðu Føroya, sum kanska eisini Javnaðarflokkurin og størri partur av Føroya fólki kann taka undir við. Somuleiðis kann sosiala áskoðanin kanska eisini fáa týdning, um valið stendur millum eitt borgarligt ella eitt sosialdemokratiskt landsstýri. Men sjálvstýrisfólk eru fyrst og fremst áhugað í at styrkja flokkin, sum er kavaður so djúpt í seinastu veljarakanningunum, at spurningurin hevur verið, um hann hevði ligið omaná, um val var. Tað kann hugsast, at ein hóvligur sjálvstýrispolitikkur og ein samhaldsfastur sosialpolitikkur kann fáa nøkur á vinstraveingi at stuðla Sjálvstýrisflokkin. Men meiri skal síggjast í verki enn orð og orðafloymur.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI



*Richard Mortensen av Argjum er nýggjur marknaðarstjóri á Føroya tele*

### Nýggjur marknaðarstjóri á Føroya Tele

Um ársskiftið tók Richard Mortensen við starvinum sum nýggjur marknaðarstjóri á Føroya Tele.

Við nýggja deildarstjóranum á marknaðardeildini, er leiðslubólkurin á Føroya Tele fullmannaður. Í honum sita, umframt Andras Róin, stjóra og Richard Mortensen, marknaðarstjóra, deildarstjórarnir á fíggjardeildini og á teknisku deild, Heini Joensen og Hjallgrím Hentze.

Richard Mortensen er argjamaður, men hevur seinastu nógvu árini búð uttanlands. Eftir lokna bankaútbúgving í Sjóvinnubankanum í 1983 fór at lesa Cand. Merc. við Handilsháskúlan í Keypmannahavn. Hesa útbúgving var hann liðugur við í 1988 og fyrstu tvey árini aftaná var hann í starvi hjá management konsulentfyritøkuni Michael Peters Group í London. Her tókst hann við marknaðarstrategi og vørumenning hjá fyritøkum sum Bridgestone og Danisco.

Í 1990 fekk Richard starv í donsku deildini hjá ensku fyritøkuni PA Consulting Group, sum er tann største fyritøkan í Danmark innan ráðgeving av leiðslum á hægsta stigi. Í alt starvast um fýra túsund fólk hjá PA Consulting, av teimum eru 280 í donsku deildini.

Tey seinastu fimm árini hevur Richard verið leiðari á deildini fyri strategi og marknaðarføring. Her hevur hann havt ábyrgdina av ráðgevingini av leiðslunum í stórum donskum norðurlendskum fyritøkum, og millum viðskiftafólkini teljast fyritøkur sum Maersk Sealand, Danfoss, Codan Forsikring, Nilfisk og størsta matvørufyritøkan í Svøríki, Sweish Meats.

Sum marknaðarstjóri á Føroya Tele fær Richard Mortensen ábyrgdina fyri 70 starvsfólkum á hesum sjey deildum: Tænastumiðstøðin, Vinnudeildin, Meginumvælingin, Teleforlagið, Telebúðir, Montørar og Tænastumenning/marknaðarføring. Avbjóðingin hjá Richardi verður at tryggja, at Føroya Tele brynjar seg til fríu kappingina so væl sum tilber, soleiðis at kundin veruliga merkir at tænastan frá starvsfólkunum á Føroya Tele er tann besta sum finst á marknaðinum.



## Terje Dal Christiansen

**8. des. 1926 – 8. nov. 2000**

*So steðgaði aftur eitt hjartaslag*
*frá stríði og strevi á foldum*
*ein sessur er tómur,*
*ein muður ei mælir,*
*ein sál fann sær frið undir moldum.*
*Vit drýpa várt høvur for deyðans makt*
*og lova av hjarta og sinni,*
*at vit skulu altíð minnast títt navn*
*og altíð æra títt minni.*

**Angen**

## Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,
Fax 314720
ella teldupost:

spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Prix-umførini nú klár

**Fyriskipararnir hava nú býtt teir 38 bólkarnar út á fýra innleiðandi umfør, sum verða komandi vikurnar**

PRIX FØROYAR
*Eyðun Klakstein*

Nú er greitt, hvussu teir mongu bólkarnir, sum meldaðu seg til ársins Prix Føroyar, skulu kappast í innleiðandi umførunum.

Fýra innleiðandi kappingar verða kring landið, og bólkarnir eru býttir so javnt sum tilber. Tvey umfør verða við 10 bólkum, og tvey umfør við 9 bólkum.

Hetta gevur 38 bólkar, og tað er ein færri enn teir 39, sum meldaðu seg til. Dynamitt 2000 tók seg í síðstu viku burtur úr kappingini aftur.



*Vágamenn fara undir somu dýnu sum Tangz í Miðvági 3. mars, tá eitt av teimum fýra innleiðandi umførunum í Prix Føroyum verður*

### Villmenn til Vágs

Fyrsta innleiðandi umfarið verður um smáar tvær vikur í Vági.

27. januar fara Z-Free, Multiple Choice, Diatribes, Týr, Feedback, Noplay, Clickhaze, B&Z og Holgar og Villmenn at kappast í VB-húsinum.

Av hesum bólkum kann nevnast, at Clickhaze var eitt av spennandi og nýggju nøvnunum í seinastu Prix Føroyar kappingini. Bólkurin var við í finaluni fyri tveimum árum síðani.

Diatriabes hevur luttikið fleiri ferðir áður, og somuleiðis er eisini við vágamonnunum í Holgar og Vilmenn, sum hesaferð skulu spæla í Suðuroy.

### Janus á egnum beinum

Næsta innleiðandi umfarið verður á Strondum 3. februar, og í hesum umfarinum verða bólkarnir FLUX, Epot, I am, No Connection, Marigold, Janus Trúgvason, Grønt Fót Slím, Pínadoyð, Phantoms og Side Effect.

FLUX kom fram í kappingini fyri tveimum árum síðani, og talan er um spennandi og ungan bólk úr Eysturoynni.

I Am hava givið fløgu út síðani seinastu kappingina, tá teir eisini luttóku, og nú fara teir at royna seg enn einaferð.

Janus Trúgvason fer at framføra sum solistur. Hann hevur áður spælt í duoini Safir, sum luttók í fyrstu Prix Føroyar kappingini í 1995 og sum eisini hevur eina útgávu á baki.

### Regnar í Klaksvík

9 bólkar verða við í kappingini, sum verður í KÍ-høllini í Klaksvík 23. februar.

Bólkarnir eru Human Chaos, PS, Tám, Daybreak, All that Rain, Lítla Rúm, Hokus Pokus og IRIS.

Kendasti av hesum bólkum er helst All that Rain, sum er mannaður við tónleikarunum, sum áður hava gingið undir navninum Kjølar. Teir hava fyrr staðið seg sera væl í Prix Føroyar kappingum.

Bólkarnir PS og IRIS eru lokal umboð, og í bólkinum Tám er ein vælkend songkvinna á odda. Tað er Sólva, sum eisini spældi í bólkinum Sólva og Bergmenn.

### Undir somu dýnu í Miðvági

Seinasta innleiðandi umfarið verður í Miðvági 3. mars, og í hesum umfarinum verða 10 bólkar við.

Teir eru Tangz, YST, Déjá Vu, Happy, Masha, M.M.M., Ahou, 200, MAS og Legazy.

Bólkurin Tangz er helst tann kendasti av hesum. Bólkurin var við í finaluni fyri tveimum árum síðani, og bólkurin hevur eisini havt eitt hitt við sanginum, sum gongur fyri seg undir somu dýnu.

200 hevur luttikið á Prix Føroyar áður, men annars er talan um fleiri lutvíst nýggjar og ókendar bólkar í hesum innleiðandi umfarinum.

### Átta í finaluna

Tveir bólkar koma víðari frá hvørjum innleiðandi umfari, og tað gevur átta finalubólkar, sum fara at kappast 21. apríl í Norðurlandahúsinum.

Serliga útvaldir dómarar fara at døma um framførslurnar hjá bólkunum í innleiðandi umførunum.

Hvør bólkur kann spæla í mesta lagi í 20 minuttir, og hendan tíðin er ásett, eftir at stóra luttøkan gjørdist veruleiki. Ætlanin var, at bólkarnir skuldu kunna spæla upp í hálvan tíma, men tað hevði givið ov langar innleiðandi kappingar.

At bólkarnir nú spæla 20 minuttir verður uttan iva ein fyrimunur fyri bæði bólkar og áhoyrarar.

# Hetlendingar byggja nýggja ferjulegu til Norrønu

**Myndugleikarnir í Lerwick fara at brúka um 25 milliónir krónur upp á nýggju ferjulegu til Norrønu**

HETLAND
*Eyðun Klakstein*

Hetlendingar fara at hava eina nýggja ferjulegu klára, tá nýggja Norrøna fer í sigling í 2003.

Havnamyndugleikarnir í Lerwick eru farnir undir fyrireikingarnar til nýggju ferjuleguna í hetlendska høvuðsstaðnum, sum fer at kosta um 25 milliónir krónur.

– Vit vænta okkum nógv av nýggju Norrønu, og tí fara vit at byggja nýggja ferjulegu, so vit kunnu fáa sum mest burtur úr sambandinum, sigur Leslie Angus, sum er havnanevndarlimur í Lerwick.

Hann er eisini formaður í hetlendska menningargrunninum, sum fríggjadagin váttaði, at hann fer at seta 50 milliónir krónur í Smyril Line.

### Eisini nýtt í Íslandi

Kommunan á Seyðisfirði í Íslandi skal eisini byggja nýggja ferjulegu til nýggja skipið hjá Smyril Line.

Ferjulegan á Seyðisfirði fer at kosta millum 50 og 60 milliónir krónur.

Nýggja Norrøna er munandi størri enn núverandi Norrøna, og tað fer eisini at hava við sær, at broytingar mugu gerast við havnalagið í Havn, har føroyska havnin hjá Norrønu er.

Gongst alt sum ætla, fer nýggja skipið hjá Smyril Line í sigling í 2003.




*Bæði hetlendingar og íslendingar byggja nýggjar ferjulegur til nýggju Norrønu hjá Smyril Line*


